

# Vilt tú lata hurðar upp?

## Skyn søkir eftir húsameklara

Føroya Banki fer í næstum at lata upp Skyn, ið fer at handla við fastognum. Saman við leiðandi meklaranum og einum samskipara verður tú partur av einum ágrýtnum toymi, sum miðvíst arbeiðir fyri einum góðum úrsliti. Vit bjóða eitt gott fakligt arbeiðsumhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Skyn leggur dent á álítandi ráðgeving, trúvirði og varandi kundanøgdsemi.

Vit sóknast eftur einum persóni við húsameklaraútbúgving ella viðkomandi útbúgving ella starvsroyndum.

Arbeiðsuppgávurnar eru millum annað:

- ☑ Framsýning av ognum
- ☑ Meting av ognum
- ☑ Papírsgongd frá A–Ø
- ☑ Umsiting av heimasíðu
- ☑ Stýring av boðsrundum

Tú hevur stóran áhuga fyri sethúsum og húsamarknaðinum. Vit leggja stóran dent á, at tú ert opin og dugir væl at skapa samband við kundar okkara. Tú hevur hug at selja, ert álitisvekjandi og kanst arbeiða skiftandi tíðir.

Vilt tú hava nærri at vita um starvið, kanst tú venda tær til Torgun Davidsen, stjóra, á telefon 557400, ella senda henni eitt teldubræv á torgun.davidsen@foroyabanki.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2007 kl. 12.
Send umsókn við útbúgvingarprógvi, CV og viðmælum til:

Skyn
C/o Føroya Banki
Att.: Torgun Davidsen
Postsmoga 3048
110 Tórshavn

# Skyn

Skyn er partur av Føroya Banka

# Ein millión

## til at marknaðarføra Føroyar

Bjóðið verðini vælkomnari til Føroya at ferðast. Søkið nú um stuðul og verið við til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál!

Ferðaráð Føroya bjóðar til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Til endamálið eru 1.000.000 kr. settar av til **serlig** marknaðarátøk.

Milliónin skal nýtast soleiðis, at føroysk virki/feløg, ið fáast við ferðavinnu, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir »krónu fyri krónu« háttinum. Hetta vil siga, at umsøkjarin letur eins stóra upphædd til verkætlanina, sum stuðul verður latin frá Ferðaráði Føroya.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, og mesti stuðul er 250.000 krónur. Ganga fleiri saman um eina verkætlan, kann í serligum føri verða vikið frá hámarkinum, treytað av at verkætlanin er av slíkari støddd, at stuðul kann verða latin.

Nýskapandi tiltøk hava fyrimun. Verkætlanir, har tvey ella fleiri virkir/feløg ganga saman hava eisini fyrimun. Verkætlanin skal ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini. Stuðul verður ikki latin til faldarar, uttan so at teir eru beinleiðis knýttir at verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til.

Tað ber til at samstarva við sambond uttanlands, men bert tann føroyski parturin í verkætlanini fær stuðul.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er framd í verki.

### Upplýsingar

Í umsóknini skal í øllum førum verða greitt frá:

- endamáli
- kostnaðarætlan
- fíggjarætlan
- tíðarætlan
- samstarvspørtum

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast Ferðaráði Føroya á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður frá www.tourist.fo og sum annars er at fáa frá Ferðaráði Føroya.

### Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 5. februar 2007.

Faroe Islands

Ferðaráð Føroya · undir Bryggjubakka 17 · Postsmoga 118 · FO-110 Tórshavn
Tlf +298 355 800 · Fax +298 355 801 · www.tourist.fo